# Minningarorð um systur mína
# Siri Davidsen

**f. 18 juli 79 † 3 aug 06**



Eitt ár er júst farið, síðan tú fór frá okkum. Eitt ár í djúpari, endaleysari sorg og sakni. Eitt ár við gráti og svárari neyð. Eitt ár við spurningum og skuldarkenslu. Eitt ár við stúran fyri hesi løtu, eg nú eri í – løtan, tá eg varð noydd at skriva minningarorð um teg og harvið endaliga góðtaka, at tú ert farin frá okkum fyri altíð úr hesi verð. Góðtaka, at eg ongantíð aftur skal hoyra teg. Ikki hoyra tín látur, tá tú komst fjasandi, og ei heldur tín grát, tá harðast leikaði á. Aldrin aftur fari eg at síggja teg ella á nakran hátt verða saman við tær her á fold. Ongantíð aftur fáa vit tosað aftur um tað, sum bert vit báðar høvdu saman. Eg fái onki svar, tá eg royni at tosa við teg, og síggi teg ikki, tá eg gráti eftir tær.

3. august 2006 kemur altíð at vera meislaður í minninum, sum tann ringasta løtan í lívinum higartil. Tá fór deyðin við tær og tú við honum, einans 27 ára gomul. Sjálvt um tú ert farin, so ert tú í mínum tonkum hvønn einasta dag. Alt minnir meg um teg – hvat eg enn geri, og hvar eg fari, so síggi og hoyri eg okkurt, sum eg kann knýta at tær. Tað tykist í løtum – og tær løtur vil eg ikki vera fyri uttan – at tú ert so nær, at eg bert skal rætta tær hondina, so ert tú aftur her hjá mær. Tí er tað so ringt at góðtaka, at tú ert so langt vekk og aldrin kemur aftur. So langt vekk, sum ongin av okkum røkkur her á foldum. Tí er tað so ringt at sleppa tær og góðtaka tað, ið hent er. Og tí er tað so svárt, tungt og ringt at siga tær eitt seinasta farvæl.

Tú vart eitt ynskibarn, og eg minnist, hvussu glað vit øll vóru, tá tú kom í verðina. 20 ár eru ímillum okkum báðar, so sjálvsagt minnist eg tíni barnaár, sum um tað var í gjár. Minnist, tá tú fór í skúla, og hvussu ringt tað var hjá tær at sleppa mammu, sum tú hevði gingið uppat, líka síðan tú vart fødd. Tú vart smæðin og sárbar. Tú vart lítilátin og góð. Tú hugsaði altíð um tey veikastu, og serliga góð vart tú við børnini og øll djór og tey við teg.

Tú setti røtur í móðirlívi og vaks til ta vænastu rósu. Tú vart so ómetaliga vøkur, so sjáldsama pen og eygagóð og lýsti alt upp, har tú kom við tínum vakurleika.

Vit - systkin - fingu børn, og har vísti tú veruliga títt viðri – fleiri ferðir og í gulli. Tú hevði tað bara í tær - hetta barnatekki - sum kom so nógvum til góðar. Tey forgudaðu teg øll sum ein – frá tí yngsta til tað elsta. Tey sóu so stórt ríkidømi í tær, tí tey vistu og merktu, at tú vart ekta góð við tey. So góða Siri – vit eru mong sum sakna teg. Ongi orð kunnu siga frá missinum og sakninum. So her eru orð bókstaviliga fátøk.

Tað vóru ikki bara vit og okkara børn, sum fingu tað gleði at kenna teg og fáa burturav øllum tí, tú hevði at geva. Eg eri so sera takksom fyri tey árini, tú arbeiddi saman við okkum í barnagarðinum í Miðvági. Tú vart avhildin av øllum, bæði starvsfelagum og foreldrum og elskað av øllum børnunum – eisini har forgudaðu tey teg. Lítilátin sum tú vart, sást tú ikki týdningin av tínum arbeiði og HVUSSU virðismikil tú vart, og HVUSSU nógv gott tú gjørdi og legði eftir tær hvønn einasta dag – sjálvt um eg mangan segði tær tað. Børnini elskaðu teg, og mangan lovaðu foreldrini olmussu tá tú hevði frí, og børnini tí ikki vildu í barnagarð. Har yviri komu øll at kenna teg sum tað hjartagóða menniskja, tú vart. Komu at kenna títt menniskjasýn og títt virði sum menniskja.

Tað seinasta bragdið, tú gjørdi, var at finna systkini hjá pápa í Onglandi – nakað, sum vit eftir so nógv ár næstan høvdu uppgivið. Tey fingu tíbetur heilsa uppá teg seinasta summar og hava verið og vitjað her hjá okkum.

Góða Siri, summi av okkum eru ikki stoypt til hesa verðina. Vit snáva øll so mangan og koma uppaftur, summi sterkari enn onnur. Eg vildi so fegin leitt teg heilskapaða ígjøgnum lívið – men tað skuldi ikki verða so.

Eg vildi givið so óendaliga nógv fyri at hildið um teg og sagt tær, hvussu góð eg eri við teg. Fortalt tær, hvussu stóran týdning tú hevði og hevur fyri meg og míni. Tú lærdi meg nógv í tínum alt ov stutta lívi. Lærdi meg at góðtaka, at summi av okkum hava eitt og fleiri lyndisbrek, sum eru so sera tung og svár at bera, men sum vit bara mugu góðtaka. Tú hevur lært meg at góðtaka nøkur menniskju, sum onnur seta seg sum dómara yvir uttan at kenna tey.

Góða Siri, eg veit at tú situr eina ella aðrastaðni og hyggur niður til okkum og gleðist yvir, at tað gongur øllum væl. Halt teg nær okkum. Vit gloyma teg aldrin.

Eg kundi hildið áfram í 1001 nátt, bara fyri ikki at sleppa tær. Men við hesum fari eg at lýsa frið yvir minnini um teg og siga tær eitt seinasta farvæl frá okkum øllum, sum vóru so góð við teg. Má góðtaka at tú ert farin. Eg veit, at tú ert komin í eitt betri stað, og at tú nú hevur fingið sálarfrið. Hvíl í friði, góðasta Siri. Vit síggjast aftur.

**Systur tín**
3 aug 07

## *Grát ei.*

*Grát ei fyri náttini,*
*tó at hon tók tínar veingir.*
*Grát ei fyri myrkrinum,*
*tó at tað sleit tínar streingir.*
*Grát ei fyri sólini,*
*tó hon blindaði eygu tíni,*
*tí hon vísti tær ein annan veg*
*við skínandi strálu síni.*

*Grát ei lítla vina mín.*
*Títt ljós so bjart man skína.*
*Eg skal biðja hestin mín*
*bera byrðu tína.*
*Grát ei lítla vina mín,*
*tí myrkrið brátt man rýma*
*og tá skalt tú vakna til ein*
*sólskinsdag,*
*har sólin bjørt man skína.*

*Hvørt suð, hvørt sveiggj, hvørt*
*andatak*
*man grát so sáran linna.*
*Djúpt í hjarta veit eg, at*
*tú sælan frið skal finna.*
*Grát ei lítla vina mín,*
*tí myrkrið brátt man rýma,*
*og tá skalt tú vakna til ein*
*sólskinsdag,*
*har sólin bjørt man skína.*

Orð og lag: Eivør Pállsdóttir



# Hitapumpur í Útvarpshøllini

TÍÐINDASKRIV

Týskvøldið 28. august kl. 19:30 verður spennandi fyrilestur í Útvarpshøllini í Sortudíki. Tveir danir frá fyritøkuni Vølund Varmeteknik koma at hava fyrilesturin, sum P/F Svend Krosstein og Sp/f Leivur Nattestad í felag skipa fyri

Vølund Varmeteknik, er ein partur av tí Svensku NIBE koncernini og er ein av teimum størstu framleiðaranum av hitapumpum í Europa, við egnari menningardeild og framleiðslu í Svøríki og aðrastaðni.

Kvøldið kemur at snúgva seg um hitapumpur. Tosað verður um ymisk sløg av hitapumpum. Hvat merkir tað at ein hitapumpa er: vatn/vatn, luft/luft ella luft/vatn, hvussu hitapumpur eru uppbygdar, o.s.fr. eisini fer fyrilesturin at snúgva seg um, hvørjar sparingar ein kann gera við at fáa sær hitapumpu, ístaðin fyri tann vanliga oljuketilin. Eisini hvussu nógv reinari og betri gagnnýtt hendan orkan er.

Tað er tó ikki nøkur nýggj orkuskipan vit her tosa um. Í grannalandinum Svøríki hevur stór menning verið av hitapumpum í eini 20-30 ár. Og tær verða nýttar til upphiting av flest øllum sethúsum og størri íbúðarblokkum.

Við støðugt vaksandi oljuprísum og krøvum um reinari orku, eru hitapumpur alt meiri umtalaðar á okkara leiðum.